# Kann man vera doktari bara í toski?!

LINJOHN CHRISTIANSEN
skipari, Umborð á Akamalik norðuri við Upernavik



**Eitt stórt tillukku við doktaraheitinum. Var ikki sørt stoltur nú vit fingu ein doktara í havfrøði. Ein doktara, ið møguliga kann betra um ta vánaligu umrøðu okkara so neyðuga tilfongi fær. Tað vit higartil hava hoyrt og upplivað er syndarligt. Persónliga gevi eg Havstovuni størsta feilin. At koyra ein tosk í eitt rokniark er vónleyst og dømt til balladu. Rokniarkið er ikki intelligent. Politikkaranir hava onki val**

Sjálvur fái eg ongantíð doktaraheitið, mín miðnámsútbúgving var saman við pápa mínum við Grindafossi. Mítt Harvard er rækjufiskiskapurin við Svalbard, Grønland og Kanada seinastu gott 30 árini.

Tað, ið altíð hevur havt mín størsta áhuga, eru tey náttúrufyribrygdi, sum ávirka fiskiskapin, so nærum alt verður vent á høvdið.

Ikki ber til at skriva alt, men eg haldi, at tað er burtur í vón og viti, at fiskifrøðingar ikki vilja kennast við ella rýma undan tí ábyrgd, at eitt eitur fiskagongd. Spurningurin um tað skal vera fiskidagar ella kvota er ilt at skilja. Okkara fiskidagaskipan gevur okkum altíð tær sonnu veiðunøgdirnar, haraftrat eru friðingarmøguleikarnir óavmarkaðir. Ein kvotaskipan sigur lítið um veiðutrýstið, men vísir bert til tey lyklatøl, rokniarkið fær. Gongur kvotan undan vera skeivleikarnir uppaftur størri.

Nú vit eru inni á fiskagongd, so tosa vit ikki um nakrar fáar fjórðingar, men nógvar hundraðtals fjórðingar. Ja so langt, at vit tosa um, at fiskurin flytur til aðrar landgrunnar, har livilýkindini eru nøgtandi.

Vit hava í rækjufiskiskapinum seinastu 20 árini havt 3 stórar flytingar. Tá stóri toskafiskiskapurin var í 80-unum, var rækjufiskiskapurin bert á mið- og norðbankunum. Í 90-unum tá toskurin hvarv, flutti stórur partur av rækjustovninum suður á toskaleiðirnar. Nú er øvugt, toskurin er ávegis aftur, fiskiskapurin eftir rækjum er nú aftur á mið- og norðbankunum. Ein flyting av stovninum á 6-800 fjórðingar.

Hvørjaferð slíkt hendir, rópa fiskifrøðingarnir neyðarróp um, at nú mugu bremsurnar sláast til. Tølini vísa, at fiskiskapurin er minkaður so nógv á økinum, tí veiðutrýstið er ov stórt. Vit, ið arbeiða saman við náttúruni siga, at hetta ikki er heilt beint, tað er fiskagongd. At fiskiskapurin er minkaður eiga so onnur at meta um, men í dag fiskar ein rækjubátur millum 8.000 og 11.000 tons.

Søgurnar um flotfiskin í seksti árunum í Grønlandi og tær milliónir av skrápi vóru øgiligar. Tað, sum hendi tá flotfiskurin hvarv, var, at skrápurin hvarv eisini og er ongantíð komin aftur, bert onkur hissini.

Eitt tað grefligasta dømi var, tá toskurin í Grønlandi hvarv í 1994/95. Glið kom á stovnin, fyrst fór hann niður í dýpið millum bankarnar og so víðari suðureftir. Tað seinasta bátarnir sóu til toskin var á Kappanum. Vert er eisini at leggja merki til, at kongafiskurin og steinbýturin fóru sama veg. Toskurin við Labrador hvarv eisini.

Nú 15 ár eru liðin, er hann ikki komin aftur. Tann toskur, ið nú er í menning, er smáfiskur.

Tosaði við kendan línuskipara; tá sigur hann, at teir høvdu fingið tveir merktar toskar á suðureysturlandinum. Annar var merktur norðan fyri Pamiut og hin sunnanfyri Nuuk. Hesir stakkals toskar hava also svomið 1000 fjórðingar. Her kunnu setast nógvir spurningar: Hví flytur hann? Hvussu nógv tons svarar hetta til? Kann hann fara longur, ella trýstur hann annan fisk at rýma?

Nøkur onnur fakta eru, at í 1995 var vánafiskiskapur undir Føroyum; veidd vórðu 6000 tons. Tað varð eisini sagt, at ongin toskur eldri enn 3 ár var á Føroyagrunninum. Í 1996 alt vent á høvdi 40.000 tons.

Tvey tey mest nevndu orðini í løtuni eru gransking og burðardygg veiða. Er tað so, at Føroyagrunnarnir eru sum eitt vatn, har onki rennur til og onki frá, so kunnu vit tosa um burðardygd. Hinvegin er samband millum fiskastovnanar so eitur onki burðardygd, her má neyv gransking til.

Náttúran er livandi, tilfeingið intelligent, men tað er rokniarkið ikki. Rokniarkið kann bert svara aftur við teimum tølum, tað verður fóðrað við.

Ctrl Alt Delete…Shut Down. Klokkan er fimm, men ikki hjá okkum…

Enn einaferð hjartaliga tillukku, hevði glett meg at sloppið at lisið eina slíka ritgerð.

# »Nei takk, eg koyri,«

PETUR Í GONG



**"Nei takk, eg koyri," svaraði gudsbarnið presti framman fyri altari. Bilurin stóð á gongubreytini uttan fyri kirkjuna, og prestur skonkti av Jesu blóði**

Søgan er íspunnin, men ikki so trupul at ímynda sær. Promillumarkið, ið plagdi at liggja um ein veðr, er nú trýst niður í ein ella tveir lítlar smakkir av somu. Og so kann man spyrja, um hetta var tí, at man við góðum hagtølum kundi vísa á, at júst hesin bólkur var ein stórur trupulleiki fyri trygdina í ferðsluni. Nei, tað var tað ikki. Tað var signalvirðið í einari slíkari lógarbroyting, sum fekk lóggevararnar at tátta enn meira í. Vit kunnu tí staðfesta, at sambært føroyskum lóggevarum er signalvirði haldgóð grundgeving fyri lógarbroytingum. Hvar eru vit endað?

Í føroysku barnabókini Flundruni stríðast nakrir smádreingir við at hála eina ovurstóra flundru upp í ein lastbil. Teir báðir leypa síðan upp í lastina, og bilurin koyrir til bygdar. Frálíkar tekningar og ein romantisk mynd, sum minnir nógv av okkum um hugnaligar dagar, eitt nú við rættina ella í hoyna, har man stóð í lastini saman við seyði ella hoyggi. Fyri sovítt eisini, tá sigur man fingin til høldar og koyrt varð við fagnaðarfólki í lastini. Men søgan um flundruna kundi eins væl endað við, at røsku dreingirnir báðir fingu hvør sína bót frá løgregluni, meðan bilførarin fekk klipp í kortið.

Fyri heilt fáum árum síðan staðfesti man, at tað ikki gav nakra meining at hava eina lóg, ið eingin kortini helt. Tá var talan um lógina, ið segði, at tú hevði ikki loyvi at fletta í egnum kjallara. Ein lóg, ið gjørdi stóran part av fólkinum til lógbrótarar. Í eini handavending varð lógin broytt, so hon var í tráð við veruleikan.

Ikki so langt eftir ta lógarbroytingina varð staðfest við mátingum, at tað var púra vanligt at koyra skjótari enn 80 km/t á landsvegunum. Minnist meg rætt, so lá miðalferðin nærri teimum 90. Nú skuldi man hildið, at tað ikki gav nakra meining at hava eina lóg, ið gjørdi so stóran part av fólkinum til lógbrótarar. Men gakk. Nú snúði tað seg um at steðga óskilinum. Hesir øru bilførarar skuldu knúgvast. Tað hevði einki at siga, at tað var vanligt at bróta lógina, og at hon sostatt ikki fylgdi veruleikanum. Løgfrøðiliga kann hetta ikki hanga saman.

Eitt av tiltøkunum at bøta um trygdina á vegunum er homogeniseringin av bótunum. Kr. 500,-. Eisini, um tú ikki hevur førleikagevandi prógv uppi á tær. Onkursvegna hevur man mett hetta vera so mikið ábyrgdarleyst, at tað má revsast hart og kontant. Men skuldi man ikki umhugsað at víðka hesa ásetingina út um ferðslulógina? Eitt nú at handverkarar høvdu sveinabrævið uppi á sær? At akademikarar innan landsumsitingina og lóggávuvaldið høvdu síni prógv uppi á sær? Annars skuldu teir fáa kr. 500 í bót.

Vit kunnu kortini gleðast um, at vit enn hava loyvi at eta kramarís við drússi, drekka kaffi, skeldast við konuna, pilka nøs, klóra okkum í nakkanum og annað mangt, hóast vit koyra bil. Bara vit ikki snakka í telefon.

Sjálvandi skulu vit øll koyra trygt undir skipaðum viðurskiftum. Tað skal bara ikki merkja, at vit helst skulu sita heima, innballað í eina tjúkka dýnu fyri ikki at koma til skaða.

Politiska skipanin hevur við ferðslulógini so klokkureint víst, at hon hevur misskilt sína uppgávu. Politikkur eigur ikki at vera annað enn implementering av fólksins vilja. Ferðslulógin við áhaldandi herðingum er ikki implementering av fólksins vilja, men júst tað øvugta.

At enda fari eg at loyva mær at spyrja eftir almennari upplýsing um hesar kollveltandi lógarbroytingar. Avmarka tær seg til morgunsendingina, ella kunnu vit vænta at fáa ein kunnandi faldara sendandi? Tað hevði jú verið gott at vita, um nú bilurin er lógligur ella ei. Um eg yvirhøvur havi loyvi at koyra børnini við honum.

Til tykkara, sum selja bilar. Minnist til, at tað er ein mangul, um tit ikki upplýsa, um bilurin, sum tit selja, ikki lógliga kann brúkast til flutning av øllum aldursbólkum.

# Tíðindaskriv frá P/F Vága Floghavn

**Tað hevði verið gott fyri ferðavinnuna, P/F Vága Floghavn og P/F Atlantsflog um ferðaavgjaldið til landið varð avtikið**

Vága Floghavn er ikki dýrasta floghavn har Atlantsflog flýgur og landsstýrismaðurin í Vinnumálum ásetur ikki gjøldini.

P/F Vága Floghavn hevur eins og Føroya fólk, Atlantsflog, landsstýrismaðurin í vinnumálum og landsstýrismaðurin í ferðavinnumálum stóran áhuga í, at hava ein so lágan ferðakostnað sum gjørligt. P/F Vága Floghavn má tó eisini, sum ábyrgdarfult partafelag, tryggja, at P/F Vága Floghavn ikki hevur varandi hall á rakstrinum.

P/F Atlantsflog hevur tíðum lagt sergjøld á ferðaseðlar (oljuavgjald) og onkuntíð hækkað sínar prísir.

*Nevndarforkvinnan í Vága Floghavn, Kitty May Ellefsen, ivast tí ikki í, at leiðslan hjá P/F Atlantsflog, tá hesi hugsa seg um eina løtu, skilur, at tað er neyðugt hjá P/F Vága Floghavn, at dagføra gjøldini, ið ikki eru dagførd síðandi 2001. Viðmerkjast kann, at heldur ikki tá var javnvág millum inntøkur og útreiðslur.*

Hinvegin hevði verið gott fyri ferðavinnuna, P/F Vága Floghavn og P/F Atlantsflog, um ferðaavgjaldið til landið varð avtikið. Hetta avgjald er áljóðandi 120 kr fyri hvønn ferðandi og hesum gjaldi ráða politikkarar fult og heilt yvir.

**Vága Floghavn er ikki dýrasta floghavn**

Landsstýrismaðurin í ferðavinnumálum førdi fram í Degi og Viku í gjárkvøldið, at Vága Floghavn er dýrasta floghavn har P/F Atlantsflog flýgur.

Tá talan er um ferðafólkagjald (tað, sum ferðafólkini gjalda) liggur Vága Floghavn í hægra endanum. Tó hevur Narsarsuaq eitt ferðafólkagjald, sum er helvtina hægri enn tað hjá Vága Floghavn. Tá talan er um startgjald og annað, sum P/F Atlantsflog skal gjalda fyri at nýta floghavnina er gjaldið hjá P/F Vága Floghavn tað lægsta har P/F Atlantsflog flýgur.

**Landsstýrismaðurin í vinnumálum ásetur ikki gjøldini**

Í gjárkvøldið, í Degi og Viku, varð eisini ført fram, at tað er landsstýrismaðurin í Vinnumálum sum ásetur gjøldini hjá Vága Floghavn. Hetta er ikki beint. P/F Vága Floghavn ásetur sjálvt síni gjøld og Vinnumálaráðið er góðkennandi myndugleiki.

**Hví hækkar P/F Vága Floghavn síni gjøld?**

P/F Vága Floghavn yvirtók í juli 2008 flogvallarvirksemið. Nevnd felagsins hevur síðani staðfest, at felagið árini síðani 1995 hevur havt eitt árligt hall áljóðandi 15,2 mió kr í miðal – 11 mió kr í 2008. Ein orsøk til hallið er, at nýtslugjøldini fyri at brúka floghavnina eru munandi lægri enn útreiðslurnar fyri at reka floghavnina. Nýtslugjøldini, sum P/F Atlantsflog rindar til Vága Floghavn eru munandi lægri enn nýtslugjøldini, sum P/F Atlantsflog rindar til flestu aðrar flogvallir.

P/F Vága Floghavn er partur av altjóða regluverki. Økið er neyvt lógarregulerað og strong krøv galda fyri flogvøllin, eitt nú trygdarkrøv. Krøvini til flogvallir eru seinastu árini herd og aðrar meira krevjandi mannagongdir settar í verk, eitt nú trygdarkanningar av ferðafólki og viðføri. Hetta kostar pengar, men eru samstundis neyðugar mannagongdir, sum eru álagdar P/F Vága Floghavn at fylgja, og sum hava ein meirkostnað við sær.

Hesin meirkostnaður skal rindast antin av brúkarunum – ferðafólki og flogfeløgum – ella av skattgjaldaranum. Vága Floghavn hevur mett tað rættast, at tað eru brúkararnir ið gjalda.

Sum áður greitt frá verður ferðafólkagjaldið dagført yvir eitt tíðarskeið á 2 1/4 ár. Í ár verður ferðafólkagjaldið hækkað við 35 kr. Í 2010 verður hækkað við 10 kr og í 2011 verður hækkað við 10 kr.